

# Javnstøðunevndin á internetinum

Javnstøðunevndin hevur nú í eina tíð roynt seg á internetinum við eini heimasíðu, har til ber hjá áhugaðum at kunna seg um m.a:

Javnstøðulógina
Útgávur
Tíðindaskriv
Sig tína ákoðan
Slóðir

**Javnstøðulógin**
Nú er høvi at kunna seg um innihaldið í lógini, sum vit fingu tann 3. mai 1994. Eisini eru nakrar viðmerkingar um nakrar av paragraffunum. Tað eru ikki so mong ár síðani, at vit fingu eina javnstøðulóg, í mun til okkara grannalond, og tí er tað serliga neyðugt við kunning um lógina og møguleikarnar hon gevur. Javnstøðulógin er til at brúka, og kemur man fram á okkurt, ið ikki er í samsvar við lógina, so er at venda sær til javnstøðunevndina.

**Útgávur**
Har ein kann lesa ársfrágreiðingar og annað frá nevndini.

**Tíðindaskriv**
Eru um ymisk aktuell mál, sum kunnu vera upplýsandi ella geva okkurt at hugsa um viðvíkjandi javnstøðu.

**Slóðir**
Her kemur tú lætt til ymsar stovnar í Føroyum, sum kunnu hava áhuga í slíkum samanhandi, ella ein kann koma út um landoddarnar at síggja, hvat ið hendir innan fyri javnstøðu í øðrum londum.

**Sig tína áskoðan**
Her er møguleiki at siga tína hugsan! Tað kann t.d. vera, hvat tit meina um javnstøðu? Hvat skuldi verið gjørt meira við? Hvussu eru møguleikarnir hjá kvinnunum og munnum innafyri øll samfelagsøkir í Føroyum, viðv. arbeiði, útbúgving, yrkiligari og mentanarligari menning. Hvør fær lønarviðbøturnar? Hvussu við virðismetingni av arbeiði, er tað ikki nakað fyir fakfeløgini at hugsa um. Evnini eru mong at hugsa um og gera nakað við.

Samleiki og mál, er eisini eitt evni sum kundi verið áhugavert at kjakast um, hvat finna vit okkum í av ókvæmisorðum? Hvat vilja vit líknast saman við? Hvar orðalag góðtaka vit, og hvar seta vit markið?

Javnstøðunevndin hevur virka rættiliga nógv fyri at fáa barnsburðargrunnin, sum eisini er við í samgonguskjalinum, at gerast veruleiki. Uppskot um hvussu hesin kann gerast og útrokningar hevur nevndin eisini gjørt og sent landssýrismanninum í vinnumálum og landsstýriskvinnuni í heilsumálum. Barnsburðargrunnurin, sum vónandi verður veruleiki skjótt, skal virka fyri, at allar kvinnur á arbeiðsmarknaðinum, fáa farloyvi við fullari løn. Eisini skulu menn kunna fara í farloyvi, uttan at tað skal haldast at vera løgið ella óhóskandi.

Javnstøðunevndin hevur í umbúna at fara í gongd við eitt skúlaprojekt um samskifti millum gentur og dreingir. Hetta er tó ikki heilt klárt enn, men vit rokna við at tað verður bæði spennandi og áhugavert.

Við heimasíðuni heldur javnstøðunevndin at í hesum tøkni tíðum er hetta ein lættur møguleiki at koma í samband við javnstøðunevndina, og henda vegin at fáa gott og gevandi orðaskifti um javnstøðumál.

**Jansy Olsen, skrivari**

# Creamy í 3'aranum



Í dag fara tær báðar genturnar í poppbólkinum Creamy at vitja í 3'aranum í SMS í Havn.

Bólkurin fer at signera fløgur, og tað fara tey at gera frá klokkan 11.30 til 12.00. Hendan hálva tíman kunu fólk, sum vilja hava nøvnini á føroysku Rannvu og donsku Rebekku á Creamy-fløguna, støkka inn á gólvið í 3'aranum.

Creamy eru í Føroyum í samband við tvær konsertir, sum verða í dag og í morgin. Bæði ítróttarhøllin á Hálsi og í Runavík var á tremur við børnum og vaksnum, tá Creamy fara at spæla í dag og í morgin.

Konsertirnar verða báðar kl. 17.00. Í dag í Havn og í morgin í Runavík.

# Neyðugt at stempla skjølini í trúnaði

*Hvørki stýrisskipanarlógin ella tingskipanin vísa á nakrar trúnaðarreglur í samskiftinum millum uttanlandsnevndina og landsstýrið*

JOHN JOHANNESSEN

Formanskapurin í løgtingsins vísir í svarinum til løgmans upp á kæruna um Heðin Mortensen, at tað er neyðugt at stempla øll skjøl, landsstýrið vil halda í trúnaði, við einum trúnaðarstemplið, skulu tey haldast í trúnaði.

Formansskapurin vísir løgmanni á, at hann bæði í tinginum og í fjølmiðlunum hevur ført fram, at øll mál, sum verða løgd fyri uttanlandsnevdina eftir grein 54 í stýrisskipanarlógini, eiga at verða viðgjørd í trúnaði.

Men somuleiðis vísir formansskapurin løgmanni á, at fyri at hetta skal bera til, mugu øll tey skjøl, landsstýrið ikki vil hava almannakunngjørd í hesum samskifti, stemplast í trúnaði.

Formansskapurin sigur seg ásanna, at innihaldið í flest øllum málum, sum verða løgd fyri uttanlandsnevndina, eru mál, sum eiga at verða viðgjørd í trúnaði. Men hvørki reglur ella siðvenja eru fyri hesum, og tí er neyðugt við stemplinum.

# Framsýning av handarbeiði, café og opið hús á Húsarhaldsskúla Føroya

Skeiðið á Húsarhaldsskúla Føroya er við at verða liðugt og í tí sambandi skipa næmingarnir á skúlanum fyri stórari framsýning av tí handaliga arbeiðinum, sum teir hava gjørt. Framsýningin í ár er størri og fjølbroyttari enn vanligt av tí at skeiðið nú er longt við seks vikum. Undirvíst hevur verið í hondarbeiðslærugreinunum, binding, tilskering, seyming, leður og skinn, patchwork, silkimáling, brodering, føroyskt bond, arbeitt hevur eisini verið við turkaðum blómum.

Í samband við framsýningina verður eisini høvi hjá teimum vitjandi at fara á café, og fáa okkurt gott afturvið einum góðum kaffimunni.



Sum nakað nýtt verður opið hús, har vitjandi, kanska serliga komandi næmingar og foreldur teirra, kunnu fáa meira at vita um skúlan.

Framsýningin er opin týsdagin 22.2. frá kl. 16-21.

Øll eru hjartaliga vælkomin.



# Løgmaður letur vera at melda

*Formansskapur Løgtingsins vísir á, at løgmaður kann velja at melda Heðin Mortensen til løgregluna fyri at hava brotið tagnarskylduna í fullveldismálinum, men løgmaður ælar sær ikki víðari við málinum*

JOHN JOHANNESSEN

»Um tygum meta, at málið eigur at verða meldað løgregluni fyri brot á revsilógina, eru tað tygum, sum tann órættaði í málinum, sum eigur at taka hetta stig«

Hetta er høvuðsniðurstøðan hjá formansskapi løgtingsins í sambandi við kæruna, sum løgmaður sendi formansskapinum um tingmannin og uttanlandsnevndarlimin, Heðin Mortensen, mikudagin.

Løgmaður metti, at Heðin Mortensen hevði brotið tagnarskyldu sína í sambandi við upprtið til ríkisrættarligu samráðingarnar, tá hann í samrøðu við Dimmalætting segði, at í uppritinum varð bert tosað um fullveldi, meðan einki varð nevnt um skiftistíð.

Men løgmaður ætlar sær ikki at fara víðari við málinum. Hann metir ikki, at Heðin Mortensen hevur framt eitt so mikið álvarsamt brotsverk, at tað eigur at verða latið løgregluni.

**Greiðar linjur**
Tað, løgmaður vildi við kæruni um Heðin Mortensen, var at fáa greiðar linjur um, hvussu samskiftið millum landsstýrið og uttanlandsnevndina skal fara fram.

Anfinn Kalsberg vísir á, at tað ikki stendur í lógini, um hetta samskiftið skal vera alment ella ikki. Og tá uppritið er stemplað í trúnaði og Heðin Mortensen tosaði við fjølmiðlarnar á ein hátt, ið bendi á, at hann beinleiðis endurgav partar av innihaldinum í tí, helt løgmaður tað vera rætt at kæra hetta fyri løgtingsins formansskapi.

– Eg haldi tað vera sera umráðandi, at upplýsingarnar, landsstýrið letur uttanlandsnevndini kunnu haldast í trúnaði, so tað ber til at lata uttanlandsnevndini allar upplýsingar, sigur Anfinn Kallsberg og leggur dent á, at hetta ikki bert skal vera galdandi, tí talan er um fullveldismálið, men í samráðingarmálum sum heild.

Løgmaður vísir á, at um neyðuga samskiftið millum landsstýrið og uttanlandsnevndina ikki verður hildið í trúnaði, er vandi fyri, at tað kemur víðari til triðja partin, ið er parturin, samráðast skal við, og tá er samráðingarstøðan longu viknað.

**Týdningarmikið at kunna fólkið**
Hóast løgmaður leggur stóran dent á at trúnaðarskydan verður hildin, er hann kortini sannførdur um, at tað er alneyðugt, at Føroya fólk verður kunnað mest møguligt í fullveldismálinum.

– Tað er ikki fyri at halda nakað loyniligt fyri Føroya fólki, at stórur dentur verður lagdur á, at trúnaðarskyldan verður hildin. Orsøkin er bert tann, at vit mugu verja samráðingarstøðu okkara.

Løgmaður sigur, at hann higartil er ógvuliga glaður fyri, at limirnir í uttanlandsnevndini higartil hava hildið tagnarnarskylduna, so væl.

– Eg haldi veruliga, at uttanlandsnevndarlimirnir hava hildið tagnarskylduna fantastiska væl, og vóni eg, at hetta góða arbeiðslag kann varðveitast.

Anfinn Kallsberg sigur, at hann orsøkin til, at hann kærdi Heðin Mortensen nevniliga var tann, at hann vildi tryggja hetta góða arbeiðslag.

– Tað, sum Heðin Mortensen segði við Dimmalætting, hevði í veruleikanum ikki so nógv upp á seg, men kærdi eg hann ikki, var vandi fyri at aðrir uttanlandsnevndarlimir fóru at halda seg kunna endurgeva úr uppritinum, og so kundi vandi staðist av hesum.

– Tað má fyri alt í verðini ikki henda, at landsstýrið í hvøjum einstøkum føri skal verða noytt at meta um, hvørjar upplýsingar kunnu latast uttanlandsnevndini, sigur løgmaður.

LØGTINGIÐ - **Formansskapurin**

**18.02. 2000**
**j. nr. 11-970002[58] fí/sd**

(at tilskila i svari)

Anfinn Kallsberg, løgmaður
Tinganes
her.

Borið bræv

Tygum hava í skrivi dagfest 16. februar 2000 til Løgtingsformannin gjørt vart við, at tygum meta, at Heðin Mortensen, tingmaður í grein í Dimmalætting 16. februar 2000, hevur framt brot á tagnarskyldu sína um upplýsingar, hann hevur fingið í Uttanlandsnevndini um uppritið til samráðingar við donsku stjórnina um rættarstøðu Føroya. Tygum heita í skrivinum á formansskap Løgtingsins um at fáa hesi viðurskifti í rættlag, hetta fyri at varðveita tað góða samstarv, sum higartil hevur verið millum Føroya Landsstýri og Uttanlandsnevndina.

Formanskapurin hevur á fundi 17. februar 2000 viðgjørt bræv tygara.
Niðurstøðan av fundinum var hendan. Formanskapurin hevur ikki viðgjørt kæruna um Heðin Mortensen serstakt. Hinvegin ásannar Formanskapurin, at tá skjøl verða latin tingmonnum merkt í trúnaði, eiga tey at verða viðgjørd í trúnaði. Formanskapurin hevur gjørt av at senda øllum tingmonnum skriv hesum viðvíkjandi. Í skrivinum verður gjørt vart við, at tað kann vera revsivert eftir § 152 í revsilógini at gera brot á tagnarskyldu. Verður tagnarskyldan brotin, eigur tann, sum brýtur hana, at verða greiður yvir, at hetta kann fáa avleiðingar fyri viðkomandi. Eisini er gjørt av at senda øllum nevndarformonnum skriv, har sagt verður teimum, at tá nevnd fær trúnaðarskjal, so eiga teir at gera hinum nevndarlimunum greitt, at tað snýr seg trúnaðarskjal. Eisini er ætlanin at gera fastar mannagongdir um útflýggjan og møguliga afturbering av slíkum skjølum.
Formansskapurin metir seg ikki at kunna gera meira við málið. Um tygum meta, at málið eigur at verða meldað løgregluni fyri brot á revsilógina, eru tað tygum, sum tann órættaði í málinum, sum eigur at taka hetta stig.

Tygum hava bæði í tinginum og í fjølmiðlunum ført tað sjónarmið fram, at øll mál, sum verða løgd fyri Uttanlandsnevndina eftir § 54 í stýriskipanarlógini, eiga at verða viðgjørd í trúnaði.
Formansskapurin ásannar, at innihaldið í flest øllum teim málum sum verða løgd fyri Uttanlandsnevndina eru mál sum eiga at verða viðgjørd í trúnaði. Men tá tað hvørki í stýrisskipanarlógini ella tingskipanini eru reglur um trúna í hesum málum og trúnaðarreglan neyvan kann grundast á eina siðvenju, er tað framhaldandi neyðugt at merkja øll skjøl, sum skulu viðgerast í trúnaði.

*Formansskapurin valdi at lata vera við at viðgera kæruna um Heðin Mortensen serstakt, men vísir løgmanni á, at hann, sum tann órættaði í málinum, kann melda Heðin Mortensen til løgregluna*


# Rover - ein bilur fyri seg!

*Fleiri og fleiri velja teir sera vælumtóktu Rover bilarnar!*



**Rover 416 SI 5 hurðar** 111 HK, 0-100 km/t 10,7 sek.
**Kr. 177.800,-**



**Rover 214 SI - 5 hurðar** 103 HK, 0-100 km/t 10,3 sek. **Kr. 149.800,-**



**Rover 420 SI** 136 HK, 0-100 km/t 9 sek. **Kr. 199.800,-**

Sosialurin - 311820



**Rover 75 1.8 Classic 4 hurðar** 120 HK
**Kr. 260.000,-**



**Rover 620 SI** 131 HK, 0-100 km/t 9,5 sek.
**Kr. 236.800,-**



**Rover 75 2.0 V6 Club** 150 HK
**Kr. 300.000,-**

*Vælkomin til ein Rover royndartúr*

P/f. D. B. Bilar J. Broncksgøta 15 - Tlf. 310 600